Umhvørvis- og vinnumálaráðið

Dagfesting: 29. september 2022
Mál nr.: 22/15350
Málsviðgjørt: JPP

Fylgiskjal 1
Javntekstur
Galdandi orðingar í løgtingslógini samanbornar við broyttu orðingarnar í løgtingslógaruppskotinum.

Galdandi orðingar	**Løgtingslógaruppskotið**
	§ 1 Í løgtingslóg nr. 64 frá 15. mai 2014 um loyvisgjald á alivinnu, sum broytt við løgtingslóg nr. 162 frá 24. desember 2015, løgtingslóg nr. 180 frá 21. desember 2018 og løgtingslóg nr. 159 frá 10. desember 2021, verða gjørdar hesar broytingar:
§ 2. ... *Stk. 2-3....*	**1.** Í § 2 verður aftan á stk. 3 sum nýtt stk. sett: "*Stk. 4.* Við átekning í figgjarlógini til inntøkujáttanina í figgjarárinum verður ásett, hvør framleiðslukostnaður fyri kilo verður nýttur. Fyri figgjarárið 2023 verður framleiðslukostnaður á 39,15 kr. fyri kilo nýttur." Stk. 4-8 verða eftir hetta stk. 5-9.
Stk. 4. Gjaldið verður ásett soleiðis: 1) Er miðal altjóða marknaðarprísurin kr. 36 fyri kilo ella hægri, er gjaldið 5%. 2) Er miðal altjóða marknaðarprísurin kr. 32 fyri kilo ella hægri, men lægri enn kr. 36 fyri kilo, er gjaldið 2,5%.	**2.** § 2, stk. 4, sum verður stk. 5, verður orðað soleiðis: "Gjaldið verður ásett soleiðis: 1) Er miðal altjóða marknaðarprísurin minni enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 0,5%. 2) Er miðal altjóða marknaðarprísurin tann sami sum ella upp til 5 kr.

3) Er miðal altjóða marknaðarprísurin lægri enn kr. 32 fyri kilo, er gjaldið 0,5%. *Stk. 5-6.* ...	hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 2,5%. 3) Er miðal altjóða marknaðarprísurin millum 5 kr. og 15 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 5%. 4) Er miðal altjóða marknaðarprísurin millum 15 kr. og 30 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 7,5%. 5) Er miðal altjóða marknaðarprísurin meir enn 30 kr. hægri enn framleiðslukostnaðurin, er gjaldið 10%.”
Stk. 7. Tøkugjaldið fellur til gjaldingar í 4 gjøldum ávikavist 1. februar, 1. mai, 1. august og 1. oktober við gjaldfreist til 20. í mánaðinum. Verður tøkugjaldið ikki goldið rættstundis, verður renta roknað við 0,7% fyri hvønn byrjaðan mánað frá gjalddegnum. *Stk. 8.* ...	**3.** Í § 2, stk. 7, sum verður stk. 8, verður “1. oktober” broytt til: “1. november”.